*Framhald av síðu 11*

vóru lagdir undir áðrenn kríggið, skuldu rættast.

Undan krígnum høvdu nógvir loysingarmenn politiskt livað av at skuldsett Danmark *fyri ikki at hava brúkt nóg mikið av peningi í Føroyum.* Arup vendi byttuni heilt við, og hann kom føroyskum krøvum á møti við at skjóta upp ymiskar skipanir, sum kundu verða Føroyum til skjótan og effektivan bata. Hevði hann ikki gjørt tað, vita vit væl, hvussu loysingarliðið tá hevði ýlt og brølað um vanrøkt av Føroyum. Nógvar av genialu loysnunum hjá Arupi, sum eru merktar av konstruktivari vælvild móti føroyskum sjónarmiðum, vórðu beinleiðis inspireraðar av práti hansara við Petur Mohr Dam og aðrar føroyskar javnaðarmenn. Nú vóru góð ráð dýr hjá fullveldismonnum, tí teir ynsktu onga semju – teir vildu tá sum nú hava konfrontatión, og valdu at skuldseta danir generelt og Arup specielt fyri at vilja keypa føroyingar. Argumentið undir krígnum um, at Danmark sum »kolonimakt« skuldi vanrøkja Føroyar, var nú ikki brúkiligt meira; tí kom *kúvendingin* hjá chauvinistunum, og síðani hevur fullveldispípan fingið tað stupida ljoðið, hon hevur enn, at danskir embætismenn við Arupi á odda *vildu køva og kvala føroyingar við ov **stórum** peningaveitingum.* Og sjáldsama skjótt so vendu allir *veður-hanarnir* tann vegin og góðkendu hetta perversa argumentið, og tað hava teir stórt sæð gjørt til henda dag! Tí tað bagir altíð illa barnið okkurt! Óansæð hvat danir gera, so skal tað fyri hesar menn vera ónt, óreint og skeivt! Primitiva *mantraið* er: Danin er fanin! Loysingarmenn eru soleiðis altíð *heilgarderaðir* í síni permanentu paranoia!

Men skal Arup lastast, skulu javnaðarflokkurin og Gamli Sjálvstýrisflokkurin lastast, tí Arup gjørdi stutt sagt ikki annað enn tað, sum javnaðarmenn og moderatir sjálvstýrismenn ynsktu, nevniliga at slóða fyri einari politiskari loysn millum Føroyar og Danmark, eini skipan, sum kundi halda, stutt sagt heimastýrislógini.

Arup var ikki nakað ómenni! Pápi mín kendi væl Arup og lat altíð væl at honum sum einum fyrikomandi, samvitskufullum og sera dugnaligum embætismanni, og harafturat var hann ein sannur Føroyavinur! Tað er ómansligt, at SS og aðrir av hansara tjóðveldislíkum alsamt spilla henda mannin út, bert tí hann við sínum effektiviteti gjørdi tað turrgeldu loysingarrørsluna arbeiðsleysa eina tíð, so menn aftaná ørvitisárini sluppu uppaftur úr sandkassanum kundu fara til arbeiðis og fáast við rættiligan politikk til gagns fyri *allar* landsins íbúgvar.

**Ein lítil uppbyggilig søga**

Fyri at upplýsa tann keldufegna Skaale eitt sindur um, hvussu forpestað lagið var millum manna, og hvussu helsligin nógv fólk vóru síðst í tretivunum og fyrst í fjørutunum, tá ið fullveldisrópini vóru hvøllari og harðari enn nú, skal eg siga SS frá einari sannari søgu úr eini lítlari bygd í Føroyum. Bygdin hevur færri enn 300 fólk – er hon nevnd, so er hon kend.

Í hesi bygd vóru íbúgvararnir stórt sæð greiðir yvir, hvør hoyrdi til hvønn politiska partin, og tí skuldi verið nøkurlunda greitt, hvussu nógvar atkvøður, hvør flokkur skuldi hava, men tað svitaðist ikki, at við hvørt valið sá tað út, sum um loysingarmenn fingu eina atkvøðu ov lítið, og javnaðarflokkurin fekk eina atkvøðu ov nógv. Hetta var leingi ein gáta, men so hendi tað, at ein av teimum valtilnevndu álitisfólkunum úr javnaðarflokkinum av misgáum kom at síggja atkvøðuseðilin hjá einum kvinnuligum veljara í bygdini. Álitisfólkið sá tey bønandi eygu hjá hesi kvinnu, sum øll hildu vera av allarítastu loysingarfólkum, – eyguni bóðu um, at tað aldri varð avdúkað, at hon valdi javnaðarflokkin, sjálvt um øll í hennara umhvørvi vórðu intimideraði til at vera loysingarfólk.

So sterkt var trýstið og kúgingin, at gerandisdagurin kundi ikki greiðast, um hon hevði spælt við opnum kortum sum javnaðarfólk. Hon mátti ýla við úlvunum fyri at fáa frið! Hon ræddist, sum so mangur fyri repressalium! Tað var ógvuliga vanligt tá!!! Hetta var eisini dømi um psykiskan yvirgang, harra Skaale, og eitt skal SS vita, og tað er, at nógv fólk í Føroyum hava tað soleiðis í dag, at tey ikki hætta sær at vísa, hvat tey halda, fyrr enn tey eru í atkvøðuboksini.

Heimildarfólkið til henda tilburð er farið undir grønu torvu, men vit eru nógv, sum hava hoyrt søguna fortalda.

**Hví vendir Skaale ikki byrsuni?**

Men hví skjýtur SS bara ein veg, nú hann er farin at reinsa og rudda upp í føroyskum fjølmiðlum, sum hann ikki heldur vera nóg álítandi? Hevur hann veruliga ongantíð varnast, hvussu egni **gurumaður** hansara í Tinganesi manipulerar við keldutilfari, bæði skrivliga og munnliga? Hvussu nógvar óhyrligheitir og vitleys postulat eru ikki komin frá hesum politiska dilettanti? Hvussu ofta hava løgtingsmenn ikki til fánýtis roynt at fingið Tinganesdrongin at hildið seg til sannleikan? Hví skipar tann keldumoralski, sannleikasøkjandi og docerandi SS ikki fyri, at kompetentir menn lata feðgarnar Hoydal og aðrar tjóðveldisdemagogar taka ein lygnadetektor? Ja, tað hevði verið nossligt, ha?

Nei, Skaale, skalt tú tøma køstin í føroyska fjølmiðlaheiminum, mást tú avgjørt leggja fyri í tínum egna flokki – har er allarmesta og fúlasta spillan. Vilt tú skjóta, mást tú kúvenda byrsumúlanum og so mást tú við tínum avmarkaða politiska handalagi ansa væl eftir, at tú ikki skjýtur teg *sjálvan* í fótin.

Føroya Javnaðarflokkur:

# Miðfyrisitingin skal umskipast og tænastan til borgaran betrast

TÍÐINDASKRIV

Miðfyrisitingin er seinnu árini vaksin uttan mið og mál. Alneyðugt er at umskipa fyristingina, so hon hóskar til føroysk viðurskifti og er fyri fólkið.

Umstøður og viðurskifti hjá fólki skulu í miðdepilin, soleiðis at borgarin kennir, at endamálið er at tæna honum. Skipanir og mannagongdir hjá almennum stovnum skulu vera greiðari og dygdarbetri, soleiðis at fólk fáa ta tænastu, sum tey hava rætt til. Tænastan skal verða til fyri borgaran, og ikki umvent.

Skipanin við teimum níggju aðalráðunum, har hvørt ráðið ber seg at sum eitt sjálvstøðugt landsstýri, skal broytast, soleiðis at vit fáa eina miðfyrisiting, sum virkar sum ein samanskipað eind.

**Kunningar- og samskiftisdiskur: hurðarnar upp í miðfyrisitingini**

Fyri at tryggja øllum borgarum rætta og eins góða viðferð, eigur ein felags avgreiðsla at verða sett á stovn. Hesin kunningardiskur skal kunna taka sær av fyrsta samskiftinum við borgaran.

Sum er renna vit frá Peri til Pól og hava trupult at finna tann stovn ella persón, sum kann geva okkum svar.

Tað skal verða møguligt hjá einstaka borgaranum at venda sær til eitt **stað** við øllum málum og fyrispurningum. Samskiftistænastan skal síðan beina málið víðari til rætta ráð ella stovn og skal eisini kunna hjálpa borgaranum, tá hesin kanska skal í samband við embætisfólk

Soleiðis nýtist borgaranum bert at kenna eina adressu og eitt telefonnummar fyri at koma á tal við einhvønn myndugleika.

Á sama hátt skal samskiftistænastan vegleiða borgaran um hvørjir kærumøguleikar eru, um hesin kennir seg órættvíst viðfarnan.

**Nýggjur bygnaður**

Javnaðarflokkurin mælir til, at aðalráðini verða fækkað niður í 6. Tá Normann -Ch-Christensen kom við sínum uppskoti, um endurskipan av miðfyrisitingini, tók Javnaðarflokkurin ikki undir við nýskipanini, men vístu á vandan var fyri at miðfyrisitingin fór at vaksa óskipað uttan at man fekk meira burturúr henni. Her hevur gingið sjón fyri søgn.

Sjálvt um bert 6 ár eru liðin síðani umskipanina, er miðfyrisitingin vaksin til 9 aðalráð, uttan at miðfyrisitingin í síni heild er blivin betri ella meira effektiv. Hvørt ráð hevur bygt upp sítt egna landsstýri, við teirri avleiðing, at kostnaðurin av sjálvari miðfyrisitingini eftir 5 árum er vaksin úr 58 mió kr. uppí 139 mió kr. um árið.

Vit skjóta tí upp at miðfyriskipanin verður skipað við 6 aðalstýrum, soleiðis at vit fáa eina fyrisiting, har málsøki, sum natúrliga hoyra saman, eisini verða fyrisitin av sama ráði.. Har samskipanin verður betri og léttari. At fyrisitingin verður meira effektiv. At arbeiðsviðurskiftini hjá starvsfólkunum verða betri og teirra evni og førleiki verða betri gagnnýtt.

1. **Løgmannsfyrisitingin**
   – samskipar landsstýrisarbeiðið og umsitur uttanlandsmál.
   Við hesum verða uttanlandsmál aftur málsøki hjá løgmanni
2. **Fíggjarmálaráð**
   – umsitur vanlig fíggjar- og peningamál umframt starvsfólkamál
3. **Innlendismálaráð**
   – hevur ábyrgd av kommunumálum, lógarmálum, landsstovnum so sum strandferðslu og bygdarleiðum, postverki, samskifti og umhvørvi.
   Undir innlendismálaráðið verða sostatt lagdir almennir stovnar, sum higartil hava verið umsitnir av vinnumálaráðnum, eins og umhvørvismál, ið hevur verið málsøki í oljumálaráðnum. Vaktar- og bjargingartænasta verður somuleiðis ábyrgdarøki í Innlendismálaráðnum.
4. **Vinnumálaráð**
   – umsitur alla kommersiella vinnu á sjógvi og landi, alivinnu, oljuvinnu, handverk og ídnað, landbúnað, orku o.s.fr.
   Higartil hevur vinnan á sjógvi – uttan alingin – verið umsitin í Fiskimálaráðnum, meðan vinnan á landið er umsitin í Vinnumálaráðnum. Javnaðarflokkurin vil gera hesi bæði ráð til eitt, sum umsitir øll vinnumál.
5. **Almanna- og heilsumálaráð**
   -umsitur almannalóggávuna, almannastovuna, primeru heilsutænastuna, serforsorg, heimarøkt, sjúkrahúsverkið, apoteksverkið. Sostatt verða Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið aftur løgd saman í eitt ráð.
6. **Mentamálaráð**
   – umsitur kirkju, útbúgving, gransking og mentamál annars

Verður miðfyrisitingin løgd fast á hesi 6 ráð, so má tann politiska kabalin við skipan av landsstýri ganga upp á aðrar mátar, t.d. við býti av nevndarsessum og nevndarformonnum í teimum ymisku nevndunum.

**Ein samanhangandi eind**

Men tað er ikki nóg mikið bert at minka ráðini í tali. Tað er eins umráðandi at tryggja, at ráðini samstarva og at arbeiði verður samskipað, so høgra hond altíð veit, hvat vinstra ger. Tí skulu mannagongdir gerast, so samstarv verður – bæði tvørfakligt og millum ráðini – í gerandisdegnum

*Framhald á síðu 21*

## Fólkið fyrst

TÍÐINDASKRIV

Við tí góða, kenda heitinum "Fólkið fyrst" er Javnaðarflokkurin farin undir eitt átak fyri at útgreina og ítøkiliggera floksins politikk. Við støði í virkisskránni, sum á mangan hátt er rættiliga leyst orðað, verður nú farið meira ítøkiliga til verka. Arbeiðið byrjaði í vár og verður hildið áfram allan vetur, har limafeløgini í tøttum samstarvi við tingmanning og starvsnevnd viðgera ymiskar politiskar høvuðstættir í okkara samfelag.

Hvørja ferð ein táttur er endaliga viðgjørdur, verður niðurstøðan fest í eitt politiskt skjal og síðani verður hetta almannakunngjørt. Tað fyrsta av hesum politisku skjølum ber heitið "Miðfyrisitingin skal umskipast og tænastan til borgaran betrast". Tað snýr seg um miðfyrisitingina, sum er vaksin nógv seinastu árini, um broytingar í bygnaðinum og um hvussu vit kunna fáa eina meira tænastuvinarliga og bíligari miðfyrisiting. Tey næstu tvey skjølini, sum eru ávegis, eru um "Ein greiðan og rættvísan fiskivinnupolitikk" og um "Tjóðskaparliga semju í sjálvstýrismálinum".

Umframt at gera politikkin meira ítøkiligan og viðkomandi fyri veljaranum, so er hetta samstundis eisini eitt útspæl, har hinir politisku flokkarnir verða kunnaðir um, hvørjar loysnir vit halda eru tær røttu.

*Tórshavn 25. sept. 2003*

**Føroya Javnaðarflokkur**



# Ungdómurin í fokus

**Nýggi leiðarin í Margarinfabrikkini, Bogi Andreasen, ætlar í vetur at skipa fyri eini røð av fyrilestrum fyri ung og onnur áhugaði. Fyrsti fyrilesturin var mánakvøldið um evnið, sjálvsvirðing. Næsti fyrilesturin verður um ein mánað, og tá verður evnið, happing**

MARGARINFABRIKKIN
*Myndir: Jens K. Vang*
*Orð:Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Tað var Jóhanna Andreasen, ið helt fyrilestur í Margarinfabrikkini mánakvøldið. Aftrat útbúgvingini sum sjúkrarøktarfrøðingur, hevur hon eisini útbúgvið seg innan sálarviðgerð.

Fyrilesturin var tann fyrsti í ein røð, sum ætlanin er at halda í Margarinfabrikkini í vetur.

Við sínum róliga og greiða máta at lýsa evnið, eydnaðis Jóhonnu at fanga áhugan fult og heilt hjá sjálvt teimum yngstu áhoyrarunum.

Hon vísti teimum á, hvussu sjálvsvirðingin er bundin at hugsanum okkarar um okkum sjálvi.

Eisini greiddi hon frá, hvussu tú kanst venda hugsanum um teg sjálvan, soleiðis at sjálvsvirðingin gerst betur.

Jóhanna sigur, at sjálvsvirðingin er av sera stóra týdningi fyri lívið hjá tí einstaka.

- Er sjálvsvirðingin lítil, sæst tað aftur á øllum økjum í lívinum, sigur hon.




*Tann 1. august tók Bogi Andreasen við sum nýggjur leiðari í Margarinfabrikkini. Hann er útbúgvin pedagokur og hevur frammanundan verið leiðari á sambýlum fyri fólk við autismu.*
*Bogi ynskir í nýggja starvi sínum at seta ungdómin í fokus á ein positivan hátt*

**Margarinfabrikkin fyri øll**

Um 50 fólk, í øllum aldursbólkum, vóru og lurtaðu eftir Jóhonnu mánakvøldið.

Nýggi leiðarin í Margarinfabrikkini, Bogi Andreasen, sigur við Sosialin, at hann ætlar at seta ungdómin í fokus á ein positivan hátt.

Eitt av tiltøkunum, sum Margarinfabrikkin fer at bjóða vetrarmánaðarnar, verður fyrilestrar um ymisk sera viðkomandi evni.

Um ein mánaða ella so, verður happing á skránni í Margarinfabrikkini.

Hvør fer at halda tann fyrilesturin, er ikki heilt greitt enn. Men Angela Petersen, sum flestu kenna frá barnaarbeiði hennara, fer at greiða frá, hvussu tað kenst at verða happað.






*Við sínum róliga og greiða máta at lýsa evnið, eydnaðist Jóhonnu at fanga áhugan fult og heilt hjá sjálvt teimum yngstu áhoyrarunum*

# Álvaleikir frumsýning leygardagin

**Leygardagin klokkan 16.00 hevur Havnar Sjónleikarfelag frumsýning av leikinum, Álvaleikir, hjá Hans Andriasi Djurhuus. Við hesum leiki brýtur sjónleikarfelagið á ein hátt burtur úr nýggjum, tí fyri fyrstu ferð fara tey at spæla við tveimum manningum**

SJÓNLEIKUR
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Tað eru 28 leikarar knýttir at leikinum, Álvaleikir, sum hevur frumsýning leygardagin. Men tey verða ikki, sum vanligt hevur verið, bundin at leikinum alla tíðina, tí tey spæla nevniliga við tveimum manningum.

Hetta er ein spennandi roynd hjá teimum, og tað er bæði stuttligt og mennandi fyri leikararnar, at spælt verður á henda hátt.

Hesin mátin at spæla sjónleik gevur eisini leikarunum ein ávísan fleksibilitet, tí nú verða tey ikki so bundin at leikinum, sum vanligt er, meðan ein leikur gongur.

**Ikki so fittur kortini**

Tað er Hedvig Westerlund, leiðarin av Barnasjónleikaskúlanum, sum her leikstjórnar bæði ungum, vaksnum og eldri í einum leiki, sum avgjørt er fyri vaksin, men sum eisini kann gleða tey, sum eru eitt sindur yngri.



*Leygardagin frumsýnir Havnar Sjónleikarfelag, Álvaleikir, hjá Hans Andriasi Djurhuus. Í hesum leikinum eru tey fægstu fitt, og sjálvt tey fittu halda sær ikki aftur at arga og spotta tey, ið eru verri fyri enn tey sjálvi*

- Her hitta vit okkara kæra milda barnaskald, Hans Andrias, í einum meira speiskum, samfelagsviðmerkjandi lagi. Vit síggja hann í einum leiki, har tey fægstu eru fitt, og sjálvt tey fittu ikki halda sær aftur í at arga og spotta tey, ið eru verri fyri enn tey sjálvi, siga tey á heimasíðuni hjá sjónleikarfelaginum, www.hsjonleik.fo

Til frumsýningina verða atgongumerki seld, tó fyri ein eitt sindur hægri prís, enn tann vanliga, sum er 100 krónur fyri vaksin og 50 fyri børn.

Tey, ið kundu hugsað sær at verið við til frumsýningina, mugu skunda sær at keypa atgongumerki, tí bert fá pláss eru eftir, siga tey í Sjónleikarhúsinum.

Álvaleikur varð fyrstu ferð prentaður í Varðanum í 1930, og sama ár varð hann leiktur í Sjónleikarhúsinum.

Síðani hevur hann verið leiktur ymsastaðni í landinum, seinast í Vágunum í 1998.